Ísraelsk álop á Gaza

Ísraelska flogvápnið søkti at fleiri støðum í Gaza-geiranum tíðliga í morgun. Palestinsku myndugleikarnir siga, at einki fólk lat lív í ísraelska álopinum, men at fleiri hús fingu skaða. Ísraelsmenn søktu millum annað at tunlum, sum hernaðarligir palestinar brúka til at smugla vápn úr Egyptalandi ígjøgnum. Eisini søktu ísraelsmenn at einum bygningi hjá trygdardeildunum í býnum Khan Younis. Ein talsmaður hjá ísraelsku herleiðsluni segði í morgun, at flogførini høvdu rakt sjey tunlar og eitt annað mál í Gaza-geiranum. Hildið verður, at ísraelska álopið í morgun er svar upp á eitt palestinskt granatálop á mál í Suðurísrael í gjár.

Ikki eftirlit við forsetanum

Íslendski forsætisráðharrin, Jóhanna Sigurðardóttir, fer ikki at biðja forsetan, Ólaf Ragnar Grímsson, vanda sær betur um orðini, tá hann úttalar seg alment. Í seinastuni hava íslendskir fjølmiðlar í tveimum umførum skrivað um ymiskt, sum útlendskir fjølmiðlar endurgóvu forsetan fyri at hava sagt. Kjakið fekk summi at halda, at forsætisráðharrin átti at biðja forsetan ansa betur eftir, hvat hann sigur, men Jóhanna Sigurðardóttir segði í gjár, at hon fer ikki at geva forsetanum nøkur slík boð.

Nógv lættari at finna sær okkurt at búgva í

Samgongan fer nú at gera tað nógv lættari hjá fólki at finna sær okkurt at búgva í og hetta verður galdandi bæði fyri ung, og eldri, støk og familjur og brekað

BÚSTAÐIR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Nú fer tað skjótt at verða munandi lættari hjá fólki at finna sær okkurt at búgva í.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, er nú í ferð við at leggja síðstu hond á trý lógaruppskot, sum skulu leggjast fyri Løgtingið í allarnærmastu framtíð.

Endamálið við teimum trimum lógunum er at gera tað munandi lættari hjá ungum og eldri, støkum og familjum og brekaðum at fáa sær tak yvir høvdið.

Í løgtinginum í gjár upplýsti hann, at hesin bústaðarpakkin, fer at gera tað møguligt at finna heilt aðrar mátar at fíggja sín bústað.

- Hetta fer at gera tað møguligt at gera lutaíbúðarfeløg og serstøk lutaíbúðarfeløg.

Hann segði, at sum støðan er nú, eru tað bara tey við egnum bústaði, ið fáa rentustuðul fyri tey lán, tey hava.

Men hereftir skal rentustuðulin eisini galda fyri lutaíbúðir av ymsum slagi.

Og skiparin verður harafturat soleiðis, at tað verður hvør lutaíbúð, sum fær rentustuðulin og hann verður sostatt ikki latin til sjálvt íbuðarfelagið.

Tað sama verður galdandi fyri mvg lógina, so at hereftir fer mvg stuðulin eisini at galda fyri lutaíbúðir og hann fer somuleiðis at verða latin til hvørja lutaíbúð og ikki til íbúðarfelagið, sum heild.

Skattalætti fyri at leiga út

Men eitt av lógunum, sum ætlanin nú er at seta í gildi, er at geva ein munandi skattalætta til tey, sum leiga út.

Hetta fer at gera tað munandi lættari at leiga út, bæði einstøk kømur, íbúðir og heil hús.

Tey, sum leiga kømur, íbúðir og hús út, fáa nú ein munandi skattalætta, men samgongan ætlar undir enn fleiri tiltøk fyri at gera tað lættari at fáa sær tak yvir høvdið. Í hesum sambandi fer tað at verða nógv lættari at byggja ymisk sløg av íbúðum, bæði til røsk og brekað

Tað fyrsta, sum verður gjørt er, at øll, sum leiga út, fáa ein skattafrían botnfrádrátt upp á 24000 krónur.

Tað merkir, at ein, sum leigar eitt verilsi út fyri 2000 krónur um mánaðin, skal als ongan skatt gjalda av leiguinntøkuni.

Men harafturat skulu bara 25% rindast í skatti av leiguinntøku, sum er omanfyri 24000 krónur.

- Hetta er ikki nøkur hørð skatting og tað skal tað heldur ikki vera, segði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Sum støðan er nú, betalir útleigarin vanligan skatt av leiguinntøkuni. Tað merkir, at leiguinntøkan verður løgd oman á vanligu inntøkuna og sostatt er skatturin av leiguinntøkuni ofta yvir 50%, tí marginalskatturin er so høgur.

Men Jóannes Eidesgaard vil heldur hava, at leigarar og útleigarar halda seg til leigulógina og ein fortreyt fyri at koma undir hesa skipanina, er, at leigusáttmáli verður gjørdur ímillum leigara og útleigara.

Ætlanin er, at allir partar skulu síggja ein fyrimun í at hava skipað viðurskifti á økinum.

Hann sigur, at hann umhugsar eisini at gera Húsalánsgrunnin til ein part av bústaðarpakkanum, serliga í sambandi við serstøk lutaíbúðarfeløg, har feløg, sum vara av brekaðum, byggja íbúðir til fólk, sum hava brek.

- Her kann Húsalánsgrunnurin verða tann, sum útvegar neyðugu fíggingina og vera við til at tryggja, at samanhangurin er í fíggingini í sambandi við serstøk lutaíbúðarfeløg, sum byggja íbúðir til brek, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Orkusparandi lán og stuðul til sethúsaeigarar

Samgongan arbeiðir við eini ætlan um at veita sethúsaeigarum lán og stuðul til orkusparandi tiltøk av ymsum slagi

ORKUSPARING
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Gongur, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vil, fer tað skjótt at bera til hjá sethúsaeigarum at fáa stuðul og lán til ymisk orkusparandi tiltøk.

Tað boðaði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, frá ið Løgtinginum í gjár.

Hann sigur, at talan er bæði um stuðul til pensjónistar at bjálva húsini, men eisini um lán til ymisk orkusparandi tiltøk.

Hann sær onga meining í at hava bæði ein bjálvingarstuðulsgrunn, ein húsalánsgrunn og ein íbúðargrunn.

Jóannes Eidesgaard staðfesti, at hesi seinastu átta, níggu árini, hevur Bjálving arstuðulsgrunnurin ikki havt fígging til at lat pensjónistum stuðul, sum vilja bjálva sær húsini.

Tí kundi hann hugsa sær allir tríggir grunnarnir, Húsalánsgrunnurin, Bjálvi ngarstuðulsgrunnurin og Íbúðargrunnin, verða lagdir saman í ein grunn.

Hann meinti at hetta fer at geva tí samanlagda, stóra grunninum møguleikan at avgreiða tær umsóknir um bjálvingarstuðul, sum hann hevur liggjandi.

So vítt, hann veit, hevur grunnurin einar 80-100 umsóknir um bjálvingarstuðul, sum ikki eru avgreiddar.

Men hann heldur eisini, at í einum tvey ára skeiði eigur Húsalánsgrunnurin at fáa møguleikan at lata ávísar upphæddir í láni til orkusparandi tiltøk, til øll vanlig hús.

Her kann talan verða um at skifta frá oljufýri til hitapumpu, men talan kann eisini verða um onnur orkusparandi tiltøk.

Hann nevndi møguleikan fyri at veita føst lán upp á einar 100.000 krónur til hvørji sethús til orkusparandi tiltøk.

Av tí, at talan er um føst lán, verður at kalla ongin umsiting av tí.

- Hetta kann eisini verða við til at skumpa undir byggivinnuna, segði Jóannes Eidesgaard.

- Verður talan um eitt tíðaravmarkað tilboð, ivast hann ikki í, at nógv fara at taka av tilboðnum og tað kann koma sera væl við hjá byggivinnuni.

- Hetta hevði verið eitt ótrúligt tilboð til byggivinnuna, sum er í einum aldudali og hetta eru ótrúlig tilboð til húsaeigarar, sum í hesum døgum meir ella minni bara verða vendir í hurðini í peningastovnunum, tá ið teir koma at biðja um lán, segði Jóannes Eidesgaard.